# Pedagogur

## til Sambýlið á Líknagøtu

Innan Heimarøktina og Serforsorgina, og stovnum undir tí við fyribilstænastu á Sambýlinum á Líknagøtu 1 í Saltangará, er eitt pedagog starv leyst til setan 1. mars 2005 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt tænastumannastarv. Løn- og setunartreytir verða eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, lønarstigini 24-33 eftir lønartalvu frá 01.10.04.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Arbeitt verður í skiftandi vaktum, tvs. tað eru dag, kvøld og náttarvaktir. Eisini verður arbeitt í vikuskiftum og á serstøkum halgidøgum

Á Sambýlinum á Líknagøtu búgva 3. ungir menn við autismu. Arbeiðið fevnir um at skipa gerandisdagin og frítíðina saman við teimum og verandi starvsfólkum. Tað krevur m.a., at tú er førur fyri at gera kropsligt arbeiði, ganga túrar, svimja, gera fimleik o.s.fr.

Starvsøkið umfatar eisini Sambýlið og Bústovnin á Rúnarvegi 3 & 6 í Runavík, ið eru undir somu leiðslu sum Sambýlið á Líknagøtu 1. Tí kann tann setti eisini rokna við at fáa aðrar uppgávur, um tørvur gerst á hesum.

Bert umsøkjara, sum hava lokið eina námsfrøðiliga útbúgving verða settir í starv.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 226121 ella á tlf. 211478. Umsóknarfreistin er mánadagin tann 14. februar 2005 og skulu umsóknirnar sendast til:

**Bústovnurin á Rúnarvegi**
**ATT.: Leiðarin**
**Rúnarvegur 6**
**FO-620 Runavík**

# Grunnur Onnu Djurhuus til áminnis um Sverra Fon

Úr grunninum er studningur at søkja til útgávu av bók ella bókum, ið hava bókmentaligt virði.

Stuðul verður ikki veittur til bøkur, ið longu eru útkomnar.

Umsóknir skulu vera Fróðskaparsetri Føroya í hendi í seinasta lagi 1. apríl 2005. Nærri upplýsingar og umsóknarblað eru at fáa hjá Setursskrivstovuni.

**Fróðskaparsetur Føroya**
Setursskrivstovan
J. C. Svabosgøta 14,
Tlf. 35 25 00

**Mentamálaráðið**
*Vinnu- og Miðnámsskúladeildin*

# Sjálvlesandi

## Innskriving til students-/HF-próvtøku

Sjálvlesandi, her í millum umgangarar, ið á sumri 2005 ætla sær til students- ella HF-próvtøku, skulu í seinasta lagi 25. februar 2005 innskriva seg til próvtøku við tann skúlan/tað skeiðið, har tey ætla sær til próvtøku. Innskrivingarblað at fylla út fæst frá studentaskúlunum og HF-skeiðunum.

Sjálvlesandi skulu rinda 300 kr. fyri hvørja lærugrein, tey innskriva seg til próvtøku í.

Tá ið tann sjálvlesandi hevur verið til próvtøku í tí/teimum lærugrein/um, hann/hon hevur innskrivað seg til próvtøku í, fær hann/hon pengarnar aftur.

**7. februar 2005**
**Mentamálaráðið**

## Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

# Javnaðarcafé

Valdagin verður Javnaðarcafé í Losjuni í Havn.
Opið verður frá kl. 9.00-20.00.
Morgunmatur verður frá kl. 9.00.

Valevnini verða at hitta.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tey, ið ynskja bil á valstaðið kunnu ringja á telefon

*** 50 98 51**
*** 50 98 52**

Gott Javnaðarval!

**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

# Til sølu

## Mitsubishi Pajero 4x4 V6



Automatisk gear · Árg. oktober 1998
Einans koyrt 58.000 km · Ein sera fínur bilur
Óslitin, - væl viðfarin.

**T.d. kann útgjaldið verða einans kr. 35.000,-**

**Lagalig fígging**

*Sí onnur tilboð á www.bilfridkan.fo*

**Bilfríðkan á Hjalla**
*Tel 35 73 00 ella 21 73 00*
*landsins lagaligasta brúktbilafígging*

Sosialurin 341800

**Mentamálaráðið**

# Stuðul til yrkisleiklist

Sambært løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003 um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m., og kunngerð nr. 18 frá 19. apríl 2004 um stuðul til leiklist v.m. verður við hesum kunnað um, at møguleiki er at søkja um stuðul til yrkisleiklist.

Umsóknarblað er at finna á heimasíðu Mentamálaráðsins: www.mmr.fo undir »Mentan« – »Oyðubløð«. Freistin at søkja er 15. mars 2005.

Viðv. treytum og møguleikum fyri stuðli verður víst til nevndu lóg og kunngerð.

Umsóknir skulu stílast:

**Mentamálaráðið**
Postmsmoga 3279
110 Tórshavn

**Mentamálaráðið**
*Vinnu- og Miðnámsskúladeildin*

# Sjálvlesandi

## Innskriving til próvtøku í ymsum miðnámsútbúgvingum

Sjálvlesandi, her í millum umgangarar, ið á sumri 2005 ætla sær til FHS-, SIF-, HH-, HT- ella HIF-próvtøku, skulu í seinasta lagi 25. feburar 2005 innskriva seg til próvtøku við tann skúlan, har tey ætla sær til próvtøku. Innskrivingarblað at fylla út fæst frá skúlanum.

**7. februar 2005**
**Mentamálaráðið**

# BILUR TIL SØLU



**Opel Astra 1.6 · Argangur 1997**
**Koyrt 90.000 km. · Biliga til solu.**

**Vinarliga ring a tel. 443080 ella 743080**